# OL-rógvari til Føroya

**Danski rógvarin Søren Madsen skal standa fyri rógvikappingini, sum verður hildin í Eystursúklanum leygardagin**

RÓGVING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Freistin at melda seg til innanduraróðrarnar í Eystursúklanum leygardagin var út í gjár, og eins nógvir rógvarar og í fjør fara at rógva, skrivar heimasíðan hjá Havnar Róðrarfelag.

Felagið kundi ynskt sær, at tað vóru fleiri ungir rógvarar við í kappingini, og hóast nógvar ungar gentur venja í rógvimaskinum kring landið, so hava tær ikki hildið seg til at luttaka í hesi innandurakapping.



*Leygardagin verður stóra innandurakappingin í rógving hildin í Eysturskúlanum í Havn. Óalmenn FM-heiti eru upp á spæl*

### Dani stendur

Havnar Róðrarfelag hevur fingið ein kendan danskan rógvara at standa fyri kappingini leygardagin. Tað er Søren Madsen, sum hevur róð við kenda danska »gullfýraranum«, og hann var millum annað við til OL í 2000 og HM í 2001.

Eftir hetta fekk Sørin skaða í ryggin og hevur mest sum ikki róð kapp síðani.

So tað verður ein kendur og virdur rógvari, sum fer at halda eyga við teimum føroysku rógvarunum til óalmennu FM-kappingina í innandurarógving leygardagin.

# Bogi og teir á odda

**Leygardagin 4. februar vóru tvey umfør í liðkappingini í bridge leikt á Handilsskúlanum á Kambsdali**

Kappingin í ár hevur verið sera jøvn og spennandi. Bæði í 1 og 2.deild hava tað verið fleiri lið um boðið. Nú kappingin er hálvrunnin, er framvegis spenningur í.

Í 1.deild hevur liðið hjá Boga Simonsen lagt seg nakað framum tey næstu liðini, men enn er einki avgjørt.

Á liðnum hjá Boga eru umframt Boga sjálvan eisini Hallberg Arnfríðsson, Jákup Hjaltalin og Arnbjørn Sivertsen.

- - -

Í 2.deild er spenningurin framvegis stórur, trý lið kappast um at fáa sess í bestu deildini komandi kappingarár. Tað er liðið hjá Marjun Restorff, ið liggur á odda í løtuni, liðið hjá Hallur Ellingsgaard og liðið hjá Jórun Johannesen.

Undan kappingini var væntað, at liðið hjá MBM fór at verða við í kappingini um aftur at fáa eitt pláss í bestu deildini, men tað hevur gingið sera illa hjá teimum at fáa spælið at rigga.

Á liðinum hjá Marjun eru umframt Marjuna sjálva eisini, Eilif Petersen, Salamon Joensen, Zacharis Joensen Arnleyg Mikkelsen og Petur Annfinn Johansen.

- - -

### 3.Deild

Var spenningurin stórur í 1 og 2. deild undan hesum vikuskiftinum, kann tað sama ikki sigast um støðuna í 3.deild. Har hevur liðið hjá Jens Paula G. Nolsøe lagt seg klárt á odda, og tað skal gangast teimum sera illa um liðið ikki skal vinna deildina.

- - -

### Multihold

Multihold er ein útrokning, ið verður gjørt, har ein áleið kann síggja hvussu tey einkultu pørini hava klára seg.

**1. Deild**

1. Bogi Simonsen - Hallberg Arnfríðsson 18,91
2. Dia Jacobsen - Marner Joensen 18,54
3. Jákup Hjaltalin - Arnbjørn Sivertsen 17,42

**2. Deild**

1. Hans Egil Joensen - Edmund Joensen 17,13
2. Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen 16,96
3. Oddmar Danielsen - Einar Ellingsgaard 16,10

**3.Deild**

1. Jens Pauli G. Nolsøe - Danny Danielsen 19,70
2. Eva Berg - Anna Olsen 16,33
3. Knútur Nygaard - Áki Dimon 16,20

### Steypakappingin

Leygardagin 4. februar var lutakast um hvør skuldi spæla móti hvørjum í steypakappingini. Fleiri spennandi dystir kunnu væntast, tann mest spennandi er ivaleyst dysturin millum liðið hjá Boga Simonsen og Símin Lassaberg.

Soleiðis skal spælast í 1. umfarinum í steypakappingini:

Símin Lassaberg - Bogi Simonsen
Heðin Mouritsen - Jóna Gruntveit
Allan Dal- Christiansen - Súsanna Dam
MBM - Marner Joensen
Óli Holm kemur víðari uttan dyst.

Allir dystirnir skulu verða leiktir áðrenn 1. mars 2006.

**Støðan í 1.deild**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Allan Dal-Christiansen | 9 | 22 | 20 | 24 | 17 | 92 | 2 |
| Bogi Simonsen | 21 | 12 | 25 | 24 | 25 | 107 | 1 |
| Símin Lassaberg | 8 | 18 | 17 | 25 | 23 | 91 | 3 |
| Eyðun Jakobsen | 10 | 4 | 13 | 10 | 25 | 62 | 4 |
| Jóna Grunnveit | 6 | 6 | 5 | 20 | 20 | 57 | 5 |
| Óli Holm | 13 | 3 | 7 | 2 | 10 | 35 | 6 |

Støðan í 2.deild

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| MBM | 9 | 4 | 12 | 6 | 12 | 43 | 6 |
| Hallur Ellingsgaard | 21 | 10 | 22 | 12 | 25 | 90 | 2 |
| Jórun Johannesen | 25 | 20 | 10 | 14 | 17 | | |
| Marita Krosstein | 18 | 8 | 20 | 11 | 20 | 77 | 4 |
| Marjun Restorff | 24 | 18 | 16 | 19 | 20 | 97 | 1 |
| Jákup Egholm | 18 | 4 | 13 | 10 | 10 | 55 | 5 |

**Støðan í 3.deild**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Knútur Nygaard | 19 | 12 | 18 | 84 | 2 | |
| EyB | 3 | 11 | 6 | 12 | 40 | 4 |
| Jens P. G. Nolsøe | 18 | 24 | 25 | 107 | 1 | |
| Súsanna Dam | 12 | 18 | 3 | 67 | 3 | |

## Magnus formaður í Fram

Ein lítil útskifting hevur verið í nevndini hjá bóltfelagnum Fram, eftir at aðalfundurin hjá felagnum var herfyri. Tað var longu greitt áðrenn fundin, at sitandi nevnd ikki fór at verða tann sama, tí Teitur Ellingsgaard og Bárður Mikkelsen fóru niður í lestrarørindum. Eisini formaðurin Anfinn L. Hansen fór av landinum. Eftir aðalfundin var greitt at Magnus Fuglø kemur í nevndina og tekur við sum formaður í felagnum. Heimasíðan hjá Fram lovar at koma við fleiri boðum, tá ið nýggja nevndin hevur endaliga skipað seg.

## Ítróttargalla í Runavík

Leygarkvøldið 4. mars verður skipað fyri Ítróttargalla í Runavík. Tað eru ítróttarfeløgini NSÍ, Støkk, Tjaldur og kapproðrardeildin hjá NSÍ, sum í felag skipa fyri veitsluni. Gallaveitslan verður hildin í ítróttarhøllini í Runavík.

Á veitsluna fara tey einstøku ítróttarfeløgini at velja sítt ársins ítróttarfólk, og eisini fer Magni Poulsen at skipa fyri undirhaldi undir borðhaldinum. Eftir borðhaldið spæla Showmenn til dans.

Skipað var á fyrsta sinni fyri slíkum ítróttargalla í Runavík í fjør, og tað eydnaðist stak væl.

**tn**

## Dani roynir seg í GÍ

Gøtumenn hava danskan spælara til royndarvenjing í hesum døgum. Talan er um Franck Bodjo, sum hevur verið við í tveimum venjingardystum. Um talan verður um meira varðandi samstarv er ikki greitt enn.

## Drúgv landsliðsferð

Fótbóltsslandsliðið, sum um 10 dagar fer á venjingarlegu í USA, fer á eina drúgva venjingarlegu hesaferð. Tað tekur nakað av tíð at ferðast aftur og fram, og samanlangt verða føroysku spælararnir burtur í 12 dagar. Ferðin gongur til Fort Lauderdale í USA, og har verður vant og spælt frá týsdegnum 21. februar til mikudagin 1. mars. Føroyska landsliðið ferðast til USA umvegis Keypmannahavn. Í Fort Lauderdale býr landsliðið á Hilton hotelli.